Kortanei at tjóðartaka AA

Tað kemur ikki upp á tal at tjóðartaka føroyskt vinnulív, og vit góðtaka als ikki, at Johan Dahl meldar slíkt út. Talan er um eitt børsskrásett felag, og tað skapar stóra órógv, tá slíkar útmeldingar koma frá landsstýrismanninum. Málið er als ikki viðgjørt í landsstýrinum, og tað stendur beinleiðis í samgonguskjalinum, at privatiserings tilgongdin skal halda fram. So lat meg sláa fast, at tað verður ikki við Fólkaflokkinum í samgongu, at Atlantsflog verður atjóðartikið, sigur Jákup Mikelsen, formaður í tingbólki Fólkafloksins.

Fínteljingin broytti einki í Klaksvík

Tjóðveldi fekk fýra atkvøður afturat, Javnaðarflokkurin eina afturat, og síðani vóru smáar innanhýsis atkvøðuflytingar ímillum valevnini eyðmerktar í fínteljingini eftir kommunuvalið í Klaksvík. Atkvøðubýtið millum tey 11 valdu í Klaksvíkar býráð var hetta: Gunvá við Keldu (A) 187- Hans Arne Bertholdsen (B) 180 - Elsebeth G. Hansen (A) 176 - Steinbjørn O. Jacobsen (E) 170 - Óli M. Lassen (A) 156 - Auðunn Konrádson (A) 146 - Eyðgunn Samuelsen (C) 139 - Jógvan Skorheim (D) 135 - Óluva Klettskarð (E) 131 - Atli Justinussen (A) 130 - Jákup Mikkelsen (C) 106

Hyggja aftur um leiðslufrágreiðingina

Í einum áhugaverdum fyrilestri á Parnassinum í gjár greiddi kendi analytikarin, Morten W. Langer, frá, hvussu miðlafólk skuldu lesa ein roknskap, og serliga hvørjum postum hyggjast skal eftir, fyri at fáa røttu myndina av støðuni hjá fyritøkuni

FYRILESTUR
Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo

Nógv miðlafólk loypa um garðin, har hann er lægstur, men tað er ov lætt um farið.

Tað sigur Morten Langer, ið er kendur danskur roknskaps analytikari, sum við øðrum gevur út heili trý ymisk fíggjarlig tíðarrit.

Hann helt fyrilestur á Parnassinum fyri miðlafólki og øðrum í gjár við eitinum »Tíðindaflutningur av fíggjardata«. Hvat skulu miðlafólk serliga hyggja at í einum roknskapi.

Sum eitt dømi dróg hann fram Parken fyri 2007. Hesin vísti eitt avlop á 80 milliónir krónur. Men við at hyggja nærri at roknskapinum sást, at 60 av teimum 80 milliónunum stavaðu frá sølu av einum dóttirfelag, nakað, sum ikki hevði komið fram við at skriva leiðslufrágreiðingina av.

Teir hava annars verið í hornatøkum báðir, Morten Langer og Flemming Østergaard, vanliga nevndur Don Ø. Fyrrnevndi hevur sett spurnartekin við fíggjarstøðuna hjá Parken, og tað hevur sjálvandi ikki hóvað Don Ø. Og fyri at varpa ljós á hetta, vísti hann eitt kjak, sum hevur verið á TV3 millum hesar báðar um júst fíggjarligu støðuna hjá Parken.

Skuldin er risastór, 1,5 milliardir, og stórslidnu ætlanirnar um bygging av frítíðarhúsum og einum nýggjum stadium tykjast ikki kunna fáast í lag, nú fíggjarkreppan herjar um allan heim.

Og fyri líkasum at undirstrika álvaran í hesum kom Don Ø fram í miðlunum herfyri og boðaði frá, at byggiætlanirnar hjá Parken eru útsettat í eitt ár.

Lyklatøl

Men hvørji eru so amboðini til at greina út fíggjarligu støðuna hjá eini fyritøku. Tað hevur Morten Langer svarið upp á.

Fyrst og fremst roknskapirnir hjá fyritøkuni, serliga ársroknskapirnir. Og har eru serligir postar, sum týðiliga vísa gongdina hjá fyritøkuni.

Aðrir indikatorar eru børsfráboðanir, ársfjórðings roknskapir, heimasíðir, herundir heimasíðir hjá kappingarneytunum.

Ein annar, og kanska serliga áhugaverdur, indikator er børsmarknaðurin. Kursirnir eru av stórum týdningi, serliga tá hugt verður at leiðsluni í felagnum. Keypir ella selur leiðslan partabrøv í egnari fyritøku – that's the question.

Morten Langer vísti annars á, hvørjir postar eru serliga týdningarmiklir í einum roknskapi, og sum siga serliga nógv um veruligu støðuna og gongdina hjá einari fyritøku.

Tað var kanska eitt sindur óheppi, at hesin fyrilesturin vendi sær móti vanligum fyritøkum og ikki tóku hædd fyri roknskapum hjá bankum, sum annars er tað, sum føroyskir fjølmiðlar hava størstan áhuga í at greina.

Eitt annað, ið eisini var eitt sindur óheppi, var, at fyrri helmingur av fyrilestrinum gjørdist so drúgvur, at meginparturin av seinna helmingi als ikki varð umrøddur vegna tíðartrot.

Kortini var talan um ein sera upplýsandi og áhugaverdan fyrilestur, sum VirðisbrævaMarknaður Føroya skipaði fyri.



Morten Langer er ein viðurkendur roknskaps analytikari, sum saman við øðrum gevur út trý fíggjarlig tíðindabløð
Mynd: Jens Kristian Vang

Dagførd við partabrævakursunum

Virðisbrævamarknaður Føroya hevur í longri tíð arbeitt við einari nýggjari heimasíðu, og í sambandi við fyrilesturin í gjár presenteraði VMF úrslitið

HEIMASÍÐA
Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo

Nú ber til hjá øllum at halda seg dagførdan við øllum partabrævakursum bæði skjótt og lætt.

Virðisbrævamarknaður Føroya, VMF, hevur konstruerað eina nýggja heimasíðu, har hvør einstakur kann velja sær út tey feløg, har tey hava partabrøv, so tey alla tíðina lætt og uttan stríð kunnu halda seg dagførd við kursirnar.

Inni á heimasíðuni ber eisini til at síggja, hvussu kursurin hjá einstøku fyritøkunum hevur sveiggjað seinastu vikurnar, mánaðirnar ella árini. Til ber at leggja mest áhugaverdu fyritøkurnar inn sum ein fastan tátt á heimasíðuna, so teir koma fram hvørja ferð, tú opnar síðuna.

Eitt annað »smart trekk« á heimasíðuni er, at upprættað er ein vinnarar/taparar listi, men av tí at íslendski keypsskálin er so óvirkin, virkar hesin ikki til fulnar. Í heila tikið ávirkar óvirkni íslendski keypsskálin í stóran mun heimasíðuna, men skálin í Keypmanahavn virkar kortini til fulnar.

Eisini ber til at velja aðrar keypsskálar, veruliga teir flestu týðandi í heiminum.

Eisini sæst vísitalið hjá OMXI-FO sum ein fastur liður tá heimasíðan verður latin upp.

Tíðindi

Heimasíðan er væl uppbygd og løtt at yvirskoða. Hon er full av upplýsingum um partabrævamarknaðirnar og viðkomandi tíðindum.

Eisini er lætt at finna runt á heimasíðuni, sum hevur nógvar viðkomandi funktiónir.

Kursirnir hjá teimum trimum røðunum av lánsbrøvum hjá Landsbankanum kunnu síggjast inni á heimasíðuni saman við effektivu rentuni.

Eitt annað áhugavert inni á heimasíðuni eru tíðindi. Bæði tíðindi frá VMF, men ikki minst tíðindi frá OMX, sum koma beinleiðis inn á heimasíðuna hjá VMF.

Alt í alt ein sera áhugaverd og viðkomandi heimasíða, sum kemur væl við hjá øllum teimum, sum hava áhuga fyri partabrøvum og partabrævakursum.

Heimasíðan eitur vmf.fo

Soleiðis sær nýggja heimasíðan hjá Virðisbrævamarknað Føroya út